**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2008?
Send eina grein til dorit@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er millum 8.000 og 10.000 tekn og skrivað í essay stíli

**Næstu ferð**
Hósdagin 24. januar: Hanus Kamban, rithøvundur: Post Festum. Akkilleushælurin hjá farnu samgonu – ein læra fyri framtíðina?



# Aftur um løgtingsvalið



**TÍÐARGREININ**
*Sámal Matras Kristiansen*

Løgtingsvalið er farið afturum, og nývaldu politikararnir kunnu nú leggja fortíðina afturum seg og hyggja frameftir. Men tað er eisini áhugavert at hyggja eitt sindur longur fram enn tilstundandi valskeið Hóast broytingarnar ikki vóru markantar í tingmannabýtinum millum flokkar, so er innahýsis tingmannabýtið avgerandi broytt, og tað kann fáa stórar avleiðingar í longdini.

Fyri tað fyrsta mugu flokkarnir spyrja seg sjálvar, hví í allari víðu verð teir stilla upp so nógv valevni, tá allar forsøgnir vísa, at tveir triðingar av valevnunum als ongan hagfrøðiligan møguleika hava at koma inn á ting. Serliga løgið er tað, tí tey flestu av hesum kjansaleysu valevnum beinleiðis eru við til at stjala atkvøður frá øðrum lokalum valevnum, soleiðis at tað verður truplari hjá realistisku valevnunum at røkka eitt nóg høgt tal av atkvøðum.

Sambandsflokkurin er eitt dømi um, at til ber at missa atkvøður vegna vantandi strategiska planlegging. Sambandsflokkurin hevði ikki megnað at funnið ein sterkan kandidat til Føroya triðstørsta valstað, Runavík. Í staðin fyri vórðu veljararnir spjaddir út á fleiri veik valevni. At runavíkingar ikki hava sæð perspektiv í at velja eitt veikt lokalt sambandsvalevni, ið ongan kjans hevði, hevur sannlíkt verið við til at skumpa veljarar yvir til Bill Justinusen í Miðflokkinum, ið var stóru sigursharrin í Runavík.

### Tjóðveldi – Høvuðsstaðarflokkurin

Tað hevur leingi verið kent, at Tjóðveldi stendur sterkast í høvuðsstaðnum. Og hesaferð vildi lagnan tað soleiðis, at ikki færri enn 6 av 8 tjóðveldistinglimum koma úr Havn – Tórbjørn Jacobsen býr jú eisini í Havn. Um Tjóðveldi hinvegin kemur í samgongu og fær umboð í landsstýrið, eru tað tó bygdafólk, ið koma inn sum eykafólk: Páll á Reynatúgvu, Heidi Petersen og Olga Biskopstø.

Um til dømis topptinglimir Tjóðveldsins Høgni Hoydal, Annita á Fríðriksmørk og Bjørt Samuelsen enda sum landsstýrismenn, vil tað knappliga vera ein yvirvág av bygdafólki í flokkinum. Um hinvegin Tjóðveldi ikki kemur í samgongu, so kann núverandi støða vísa seg at gerast hættislig. Tað er jú fyrst og fremst flokkurin á tingi, ið myndar ein flokk úteftir. Og veljarin kann skjótt fáa ta fatan, at flokkurin hugsar ov nógv um Havnina og minni um restina av landinum.

Sæð út frá sama sjónarmiði kann tað eisini vera ein trupulleiki, um Tjóðveldi velur at seta sínar topptinglimir í eitt landsstýri. Landsstýrismenn eru jú teir best profileraðu politikararnir av øllum, og harvið vil ein slík strategi vísa seg at styrkja flokkin uppaftur meiri í høvuðsstaðnum, meðan tað verður samsvarandi trupulari hjá lokalfeløgunum at stilla upp valevni, ið kunnu bjóða havnarfólkunum av.

### Fólkaflokkurin - Útjaðaraflokkurin

Umvent Tjóðveldi hevur hin stóri loysingarflokkurin, Fólkaflokkurin, víst seg at kunna víðariføra sína søguligu styrki kring um í landinum. Tá Føroyar gjørdust eitt valdømi, var metingin hjá undirritaða, at smáu flokkarnir fóru at vinna fram, og at hesin vøkstur serliga fór at stava frá eini minking hjá Fólkaflokkinum. Hetta tí at konservativi Miðflokkurin og liberali Sjálvstýrisflokkurin hugsjónarliga liggja hvør síni megin liberal-konservativa Fólkaflokkin. Fólkaflokkurin berjist sostatt á tveimum hermótum samstundis móti sínum smærru borgarligu kappingarneytum.

Veljarakanningar stóðu leingi til at vátta hesa meting, men sum so mangan áður megnaði Fólkaflokkurin at svinga seg upp úr aftur vánaligu veljarakanningunum og fáa eitt hampiligt val.

Serliga í Klaksvík, í Havn og Sýmsastaðni í Eysturoynni vístu smáu flokkarnir seg at eta burturav Fólkaflokkinum. Men Fólkaflokkurin megnaði umvent at fáa tað innaftur frá Javnaðarflokkinum í Suðuroy, sum hann misti í norðaru landspørtunum. (sí talvu)

Eftir við svartaperi situr sostatt Javnaðarflokkurin við einum mistum tinglimi.

Sí talvu

Fólkaflokkurin stendur sum heild styrktur eftir valið. Suðuroyggin – søguliga veiki liðurin hjá Fólkaflokkinum – er tikin, og tað við lít. Størsti valslúkur floksins er nú úr Suðuroy. Flokkurin varðveitir tveir mans í háborgini Norðoyggjum og varðveitir ein í Eysturoy og ein í Vágunum. Haruframt stendur Heðin Zachariassen úr Sundalagnum til at koma inn, um flokkurin fær landsstýrismenn. Harumframt hevur flokkurin tveir tinglimir úr høvuðsstaðnum, so sum heild hevur Fólkaflokkurin strategiskt sæð fingið eitt rimmar val.

### Javnaðarflokkurin mist Norðurføroyar

Javnaðarflokkurin hevur søguliga verið ein suðuroyarflokkur. Her hevur flokkurin søguliga fingið tveir tinglimir. Men nú er einans Jóannes Eidesgaard eftir. Bæði Nita Næs og Mikkjal Sørensen vórðu ov stutt, ivaleyst tí at løgmaður í hesum føri var ein ov stór atkvøðumagnet.

Nakað norðanfyri hevði Javnaðarflokkurin tó eina suksesøgu í einum annars miserablum vali. Gerhard Lognberg, ið leingi hevur verið hartaður fyri ikki at hóska inn í Javnaðarflokkin, vísti seg at gerast "vinnarin millum taparanar". Gerhard er eitt gott dømi um, at tað lokala ikki nýtist fáa minni at siga við einum valdømi, men beinleiðis kann gerast ein styrki hjá einum valevni.

Javnaðarflokkurin stríðist eisini við nakrar av somu trupulleikunum, ið Tjóðveldi dregst við. Helvtin av tinglimum Javnaðarfloksin eru úr høvuðsstaðnum: Helena Dam á Neystabø, John Johannesen og Katrin Dahl Jacobsen.

Harumframt verjir Hans Pauli Strøm borg í Vestmanna, sum eftir øllum at døma er á veg at gerast ein partur av Tórshavnar kommunu. Hans Pauli Strøm fær eisini flestu atkvøður sínar í høvuðsstaðnum, so hóast hann býr í Vestmanna, er hann í grundini eisini ein (hálvur) høvuðsstaðarpolitikari. Harvið er Javnaðarflokkurin eins og Tjóðveldi domineraður av høvuðsstaðnum.

Tað, ið serliga má níva hjá Javnaðarflokkinum eru fadesurnar í norðara parti av landinum. Hvørki í Eysturoy ella í Norðoyggjum kláraði flokkurin at verja borg, og í Vágunum megnaði hann heldur ikki at vinna ein tinglim. Men Andrias Petersen (Eysturoy), Eyðgunn Samuelsen (Norðoyggjar) og Kristoffur Gaardlykke (Vágar) standa klár at koma á ting, um flokkurin kennir sær tørv á at styrkja seg í hesum økjunum.

### Smáu flokkarnir sigursharrar

Smáu flokkarnir vóru stóru vinnararnir á valinum 2008. Í 2004 fingu smáu flokkarnir umleið 3.122 atkvøður og tríggjar tinglimir. Í 2008 fingu smáu flokkarnir umleið 5.067 atkvøður og fimm tinglimir. Atkvøðutalið og tingmannatalið hjá stóru flokkunum eru hinvegin tóðnað í mun til í 2004.

Ein av orsøkunum til at smáu flokkarnir hava tikið seg fram, er at bygnaðarliga haftið við valdømunum ikki longur er til. Smáu flokkarnir eru ei longur tvingaðir til at vera lokalir, men kunnu nú reelt fáa atkvøður úr øllum landinum. Smáu flokkarnir hava tikið seg fram í nógvum týðandi valstøðum, har teir annars ikki hava fingið nakrar serligar atkvøður – til dømis í Vági, á Tvøroyri, í Sandavági, í Vestmanna og í Kollafirði.

Spurningurin er so, um smáu flokkarnir fara at megna ein uppaftur størri vøkstur í framtíðini, nú stóru flokkarnir ikki hava tryggjaðan framíhjárætt gjøgnum valdømini. Nú er tað í hvussu er ikki longur tann lokala styrkin, ið er altavgerandi fyri valúrslitini, men heldur hvussu væl flokkarnir megna at tillaga seg til nýggj rák í samfelagnum. Her kunnu teir smáu flokkarnir vísa seg at vera kvikari at umstilla seg enn stóru flokkarnir. Vit hava jú týðiliga sæð hvussu skjótt tað var hjá Sjálvstýrisflokkinum at útskifta konservativa profilin við ein meiri liberalan profil og hvussu skjótt tað var hjá Miðflokkinum at flyta meiri fokus yvir á sosial tema heldur enn einans at byggja á moralsk tema. Í báðum førum hevur tað borið stóran ávøkstur.

Fyrimunurin hjá smáu flokkunum kann júst verða, at teir í størri mun enn stóru

*Framhald á næstu síðu*

| | Tvøroyri 2008 | Tvøroyri 2004 | Vágur 2008 | Vágur 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 24,2 % | 11,9 % | 23,9 % | 16,5 % |
| Javnaðarflokkurin | 41,9 % | 50,2 % | 20,3 % | 31,0 % |